## Talvið hesa vikuna

**Vallejo Pons, F (2686) - Kasparov, G (2804)**
XXII SuperGM Linares ESP (3), 25.02.2005

**1.Rif3 d5 2.d4 e6 3.c4 dxc4** Móttikið dronningagambit **4.e4 b5 5.a4 c6 6.axb5 cxb5 7.b3 Bb7 8.bxc4 Bxe4 9.cxb5 Rif6 10.Be2 Be7 11.0—0 0—0 12.Nc3 Bb7 13.Bf4** Bf4 er ikki áður leikt á høgum støði. Helst óttaðist Vallejo onkran nýggjan leik frá Kasparov, um hann leikti tað vanliga Rie5 **13...Bb4 14.Ria4 Ribd7 15.Fb3 Rid5 16.Bg5 Be7 17.Bd2 a6 18.b6 Bc6 19.Rie5 Rixe5 20.dxe5 Rixb6! 21.Rixb6 Fxd2 22.Rixa8 Fxe2 23.Ric7 Fxe5** Kasparov hevur offrað sindur av materiali fyri gott spæl. **24.Fg3 Ff5!** Svartur kundi býtt frúgvarnar av og varðveitt tvær meirfinnur. Men tíðarneyð hjá Vallejo í huganum, umframt at halda støðuna kompliseraða, velur Kasparov tann djarva vegin **25.Rxa6 Be4 26.Ra7 Bc5 27.Ra5?** Einasti feilur hjá Vallejo í talvinum. Ra4 var rætti leikurin. Spániólin yvirsá helst leik 29 hjá Garry **27...Bxf2+! 28.Fxf2 Fxa5 29.Rixe6**



**Støðumynd eftir 29. Rixe6**

**29...Bxg2!** Hvítur hevur nú tvær finnur minni og gavst. Flytur hvítur rókin, vinnur fxe6. Og Kxg2 hjálpir heldur ikki orsakað av Fd5+ og Fxe6 **0—1**

# Heimsins sterkasta talvkapping

**Garry Kasparov er eftir fýra umfør á odda í superstórmeistarakappingini í Linares, Spania**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Síðani spanski ríkmaðurin Luis Rentero Suaréz tók yvir Linares-konseptið í 1980, hevur kappingin verið kallað "Wimbledon of chess". Í dag eru tríggjar sokallaðar Grand Slam talvkappingar um árið: Wijk aan Zee, Linares og Dortmund.

Garry Kasparov tók fyrstu ferð lut í Linares í 1990 og hevur vunnið kappingina ikki færri enn átta ferðir. Fýra ferðir er Kasparov endaður næstfremstir og tveir ferðir á triðja plássi. Avrik sum tala fyri seg.

Í 2003 endaðu Peter Leko og Vladimir Kramnik framman fyri Kasparov og í fjør vann Kramnik aftur framman fyri Kasparov. Í fjør tapti Kasparov einki talv í Linares, men hinvegin vann hann bert eitt talv og leikti ellivu javnleikir. Men í ár hevur russiska legendan longu vunnið tvey talv og leikt tveir javnleikir. Formurin tykist góður, hóast hann hevði betur støður í teimum báðum talvunum, ið endaði við javnleiki.

Sjey telvarar taka lut og telvað verður tvær reisir ímóti hvørjum øðrum, tólv umfør í alt. Viswanathan Anand verður mettur at hava eins góðar møguleikar at vinna Linares sum Kasparov. Somu favorittrollu hevur Peter Leko eftir kappingarsigurin í Wijk aan Zee í januar. Umframt hesar tríggjar, mugu vit ikki gloyma Veselin Topalov, ið er ein sannur álopstelvari. Topalov er í løtuni triðfremstur á altjóða styrkilistanum, bert aftan fyri Kasparov og Anand.

Bretin Michael Adams hevur høgt styrkital, men hevur ikki vunnið slíkar sterkar kappingar í áravís. Teir lægstrataðu í ár eru lokala hetjan Vallejo Pons og FIDE-heimsmeistarin Rustam Kasimdzhanov.

Eftirsum luttakaratalið er sjey, hava ikki allir telvað eins nógv talv.

### Støðan

| | | |
|---|---|---|
| Kasparov | (2804) | 3,0 av 4 |
| Anand | (2786) | 2,5/4 |
| Kasimdzhanov | (2678) | 2,5/5 |
| Topalov | (2757) | 2,0/4 |
| Leko | (2749) | 2,0/4 |
| Adams | (2741) | 2,0/5 |
| Vallejo | (2686) | 1,0/4 |

Kasimzdhanov hevur yvirraskað við støðugari tryggari telving, sum hevur givið honum fimm javnleikir. Topalov hevði fullkomiliga vunna støðu móti Leko í triðja umfari (endaði javnt) og átti av røttum at havt fleiri stig enn síni higartil tvey. Talvini hjá Topalov hava verið sera undirhaldandi.

Kasparov hevur vunnið seinastu tvey talvini og spurningurin er, um hann megnar eitt hattrick tá hann í toppuppgerðini mánadagin hittir Anand.

### Talvsambandið 35 ár

Í samband við at tríatifimm ár eru liðin síðani Talvsamband Føroya varð stovnað, verður jubileumskapping í Vestmanna leygardagin tann 5. mars.

Talan er um liðkapping við seks telvarum á hvørjum liði. Umhugsunartíðin er 15 min. til hvønn telvara. Byrjað verður kl.10.00 í bygdarhúsinum í Vestmanna.

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Tilmelding til FM yngri deildir



Í ár verður FM hjá nøkrum deildum eitt sindur øðrvísi enn tað hevur verið tey seinasti árini. Flogbóltssambandið hevur avgjørt at hjá mans- og kvinnuunglingum og dreingir og gentur 14 verða finalur leiktur í Hoyvikshøllini tann 16. apríl. Tað vil siga at tvey lið í hvørjum av hesum bólkunum kvalifisera seg til finalurnar sum verða leiktar á ny´ggja vøllinum sum fyrstu ferð var ny´ttur til steypafinalurnar í ár.

Í øllum øðrum deildum verður leikt á eftir sama leisti sum ny´ttur hevur verið tey seinastu árini. Leikt verður soleiðis:

Mans- og kvinnuunglingar 24. mars í Hoyvíkshøllini og fimleikarhøllini í Hoyvík (tvey tey bestu liðini leika finalu 16. apríl)

<u>Gentur 14</u> 28. mars í Hoyvíkshøllini og fimleikarhøllini í Hoyvík (tvey tey bestu liðini leika finalu 16. apríl)

<u>Dreingir og gentur 10</u> 9. apríl í Gundadalshøllini, Høllini á Hálsi, Hoyvíkshøllini og fimleikarhøllini í Hoyvík

<u>Dreingir og gentur 12</u> 9. apríl í Gundadalshøllini, Høllini á Hálsi, Hoyvíkshøllini og fimleikarhøllini í Hoyvík

<u>Dreingir 14</u> 9. apríl í Gundadalshøllini, Høllini á Hálsi, Hoyvíkshøllini og fimleikarhøllini í Hoyvík (tvey tey bestu liðini leika finalu 16. apríl

<u>Dreingir og gentur 16</u> 9. apríl í Gundadalshøllini, Høllini á Hálsi, Hoyvíkshøllini og fimleikarhøllini í Hoyvík

Skipanin við ábyrgdarfeløgum verður eisini ny´tt í ár.

Tilmeldast skal hjá Virgar á teldupostbústaðið <u>lyngheyg@post.olivant.fo</u>

Seinasta freist at melda til er 11. mars.